Sosialurin



# Republikanararnir kunnu fáa ein frammaná í morgin

**Valið í morgin kann gerast ein sonn vanlukka fyri tann republikanska flokkin, tí umframt Hvítu Húsini kann hann eisini missa fleiri sessir í Kongressini**




*Eftir hesum valkortinum stendur Barrack Obama til at vinna í statum við 278 valmonnum, meðan John McCain stendur til at vinna statir við 132 valmonnum. Eftir at kappast um eru statir við 128 valmonnum*

*Kort: Aftenposten*

Nógv bendir á, at dagurin í morgin kann gerast ein av teimum svørtu døgunum í søguni hjá republikanska flokkinum í USA. Sambært meiningakanningunum stendur flokkurin til at missa forsetaembætið, men harafturat er tað líkt til, at flokkurin eisini kann missa fleiri sessir í Kongressini.

Politiskir eygleiðarar siga, at umstøðurnar hava ikki verið republikanska flokkinum til vildar hesaferð. Í fyrsta lagi líður flokkurin undir, at floksfelagin í Hvítu Húsunum, George W. Bush, er so illa umtóktur, at tað finnast neyvan fordømi um tað í søgu landsins. Í øðrum lagi hevur Bush-umsitingin ikki verið serliga heppin við at taka sær av fíggjarkreppuni, og í triðja lagi tykjast fleiri amerikanarar at vera hugtiknir av Barrack Obama heldur enn John McCain.

Hjá demokratunum er støðan tann øvugta. Teir vænta at fáa uppaftur størri meiriluta í Kongressini, enn teir hava havt síðani miðvalið í 2006, tá millum annað misnøgdin við kríggið í Irak gjørdi, at nógvir republikanskir kongresslimir fullu.

### Kunnu fáa ræðið

Í morgin skulu veljararnir manna ein triðing av teimum 100 sessunum í Senatinum og alt Umboðsmannatingið. Tveir triðingar av teimum senstasessunum, sum eru á vali í morgin, eru nú mannaðir við republikanarum, men nógv bendir á, at tað verða demokratar, sum seta seg í teir aftan á valið í morgin.

Teir seinastu dagarnar hevur John McCain ávarað republikonsku veljararnar ímóti at lata demokratarnar fáa forsetaembætið og fult ræði á Kongressini, tí so koma teir at sita á allari lóggávu tey næstu árini.

Í løtuni hava demokratarnir 51 senatorar og republikanararnir 49, men sambært teimum seinastu meiningakanningunum kunnu demokratarnir fáa seks ella sjey senatorar afturat.

Í Umboðsmannatinginum hava demokratarnir greiðan meiriluta við 235 limum ímóti teimum 199 hjá republikanska flokkinum. Kanningarnar siga, at her fáa demokratarnir millum 20 og 30 afturat í morgin.

Politiskir eygleiðarar siga, at fáa demokratarnir bæði frosetaembætið og fult ræði á Kongressini, kann tað rudda slóð fyri, at Barrack Obama kann fremja tann politikk, sum hann hevur lagt fram undir valstríðnum.

# The Boss spældi »The Rising« fyri Barrack Obama



*Bruce Springsteen á pallinum í Cleveland saman við Barrack Obama*

*Mynd: Polfoto*

Demokratiska forsetavalevnið fekk í gjár hjálp frá tónleikastjørnuni Bruce Springsteen

Meiri enn 60.000 fólk vóru komin saman til veljarafund hjá Barack Obama í býnum Cleveland í statinum Ohio í gjárkvøldið. Men tey vóru tó ikki bara komin at lurta eftir Obama, tí undan fundinum var fráboðað, at sjálvur Bruce Springsteen skuldi á pallin.

Við einum akustiskum gittara spældi stjørnan millum annað lagið „The Rising", eitt lag, sum hevur verið nógv brúkt í sambandi við veljarafundir hjá Barrack Obama.

- Eg havi brúkt 35 ár til at skriva um USA og amerikanska fólkið, og hvat tað merkir at vera amerikanari. Tjóðini trøvar ein, sum hevur teir eginleikar, sum júst Obama hevur, segði Springsteen og varð dúgliga fagnaður.

Demokratiska forsetavalevnið duldi heldur ikki fyri, hvat hann heldur um The Boss:

- Tað eru bara nøkur heilt fá, sum ígjøgnum sín tónleik og sang seta sín dám á okkara lív við at siga okkum søguna um tað amerikanska fólkið, og Bruce Springsteen er ein teirra, segði Obama.